# Leikarayvirlit

**91 leikarar hava higartil umboðað Føroyar í altjóða fótbóltsdystir. Niðanfyristandandi yvirlit sýnir, hvørjir leikarar eru, nær teir hava leikt hesar dystir og ávíkavíst hvussu nógvar altjóða dystir og mál hesir eru skrásettir fyri. Talið í klombrum aftan fyri dystartalið sigur, hvussu ofta leikararnir hava verið millum teir 11 fyrstu á vøllinum.**

| Leikari | Føddur | ár | Dystir | mál |
|---|---|---|---|---|
| Óli Johannesen | 06.05.1972 | 1992/2004 | 70 (68) | 1 |
| Jens Martin Knudsen | 11.06.1967 | 1988/2004 | 63 (58) | |
| Julian S. Johnsson | 24.02.1975 | 1995/2004 | 60 (56) | 4 |
| John Petersen | 24.04.1972 | 1995/2004 | 57 (52) | 6 |
| Allan Mørkøre | 22.11.1971 | 1990/2001 | 54 (50) | 1 |
| Øssur Hansen | 07.01.1971 | 1992/2002 | 51 (43) | 2 |
| Jens Kristian Hansen | 03.09.1971 | 1994/2002 | 44 (44) | 3 |
| Todi A. Jónsson | 02.02.1972 | 1991/2001 | 43 (42) | 9 |
| Jan C. Dam | 07.09.1968 | 1990/2000 | 39 (37) | 1 |
| Pól Thorsteinsson | 17.11.1973 | 1997/2004 | 37 (34) | |
| Kurt Mørkøre | 20.02.1969 | 1988/2001 | 37 (29) | 3 |
| Jákup á Borg | 26.10.1979 | 1998/2004 | 37 (29) | 2 |
| Uni Arge | 20.01.1971 | 1992/2002 | 37 (24) | 8 |
| Jákup Mikkelsen | 16.08.1970 | 1995/2004 | 36 (35) | |
| Henning Jarnskor | 15.11.1972 | 1994/2000 | 35 (26) | 2 |
| Jan Allan Müller | 25.07.1969 | 1988/1998 | 34 (28) | 4 |
| Fróði Benjaminsen | 14.12.1977 | 1999/2004 | 30 (27) | 2 |
| Rógvi Jacobsen | 05.03.1979 | 1999/2004 | 30 (13) | 5 |
| Kári Reynheim | 15.02.1964 | 1988/1995 | 27 (26) | 2 |
| Tummas Eli Hansen | 11.02.1966 | 1989/1995 | 27 (26) | |
| Magni Jarnskor | 16.11.1968 | 1989/1998 | 27 (20) | |
| Hans Fróði Hansen | 25.08.1975 | 1998/2003 | 26 (26) | |
| Jóannes Jakobsen | 25.08.1961 | 1989/1993 | 25 (25) | |
| Jens Erik Rasmussen | 02.06.1968 | 1988/1997 | 25 (14) | 2 |
| Sámal Joensen | 15.01.1975 | 1997/2002 | 24 (17) | |
| Abraham Løkin (Hansen) | 16.06.1959 | 1988/1994 | 22 (22) | |
| Jón Rói Jacobsen | 07.04.1983 | 2001/2004 | 20 (17) | |
| Christian Høgni Jacobsen | 12.05.1980 | 2001/2004 | 20 (12) | 2 |
| Mikkjal Danielsen | 16.05.1960 | 1988/1992 | 18 (17) | |
| Torkil Nielsen | 26.01.1964 | 1988/1993 | 18 (16) | 2 |
| Súni Olsen | 07.03.1981 | 2001/2004 | 18 (13) | 1 |
| Jóhannis Joensen | 27.11.1970 | 1999/2003 | 17 (9) | |
| Andrew av Fløtum | 13.06.1979 | 2001/2004 | 16 (6) | 1 |
| Alvi Justinussen | 06.12.1968 | 1992/1993 | 12 (11) | |
| Hjalgrím Elttør | 03.03.1983 | 2002/2004 | 12 (3) | |
| Johan Byrial Hansen | 18.09.1975 | 2000/2004 | 11 (9) | |
| Heðin á Lakjuni | 19.02.1978 | 1999/2004 | 11 (5) | 1 |
| Janus Rasmussen | 02.06.1965 | 1994/1996 | 10 (8) | |
| Jann Ingi Petersen | 07.01.1984 | 2003/2004 | 10 (7) | |
| Allan Joensen | 03.01.1974 | 1995/2003 | 8 (5) | |
| Arnbjørn Danielsen | 14.10.1973 | 1997/2004 | 8 (4) | |
| Atli Danielsen | 15.08.1983 | 2003/2004 | 8 (1) | |
| Jónhard Frederiksberg | 27.08.1980 | 2003/2004 | 7 (4) | |
| Gunnar Mohr | 17.07.1963 | 1989/1993 | 7 (1) | |
| Julian Hansen | 02.08.1963 | 1988/1990 | 6 (6) | |
| Helgi L. Petersen | 05.04.1978 | 2001/2003 | 6 (1) | |
| Jákup Símun Simonsen | 17.02.1966 | 1991/1992 | 5 (4) | |
| Harley Bertholdsen | 10.03.1969 | 1992/1996 | 5 (2) | |
| Djóni N. Joensen | 21.08.1972 | 1994/1997 | 5 (2) | |
| Páll á Reynatúgvu | 26.07.1967 | 1993/1993 | 5 (2) | |
| Andreas F. Hansen | 18.11.1966 | 1995/1996 | 4 (4) | |
| Poul Enok Hansen | 15.10.1963 | 1988/1990 | 4 (4) | |
| Bartal Eliasen | 23.08.1976 | 1997/2002 | 4 (4) | |
| Kaj Leo Johannesen | 28.08.1964 | 1991/1992 | 4 (3) | |
| Albert Ari Thomassen | 03.02.1971 | 1991/1991 | 4 (2) | |
| Eyðfinn Davidsen | 19.01.1966 | 1991/1995 | 4 (0) | |
| Claus Bech Jørgensen | 27.04.1976 | 2004/2004 | 3 (3) | |
| Kristian Petersen | 27.06.1958 | 1988/1989 | 3 (3) | |
| Rúni Nolsøe | 21.05.1971 | 1993/1997 | 3 (1) | |
| John Ryan (Hansen) | 16.03.1974 | 1992/1999 | 3 (1) | |
| Torbjørn Jensen | 17.08.1965 | 1992/1992 | 3 (0) | |
| Bjarni Johansen | 26.05.1971 | 1993/1997 | 2 (2) | |
| Jón Johannesen | 10.08.1968 | 1992/1993 | 2 (2) | |
| Súni Fríði Johannesen | 20.10.1972 | 1993/1995 | 2 (1) | |
| Eyðfinn Olsen | 25.04.1963 | 1993/1993 | 2 (1) | |
| Jákup Eli Olsen | 02.10.1972 | 1992/1997 | 2 (1) | |
| Tór-Ingar Akselsen | 01.05.1981 | 2003/2003 | 2 (0) | |
| Símun Eliasen | 24.11.1974 | 1996/1996 | 2 (0) | |
| Christian Lamhauge Holst | 25.12.1981 | 2003/2004 | 2 (0) | |
| Ingi Rasmussen | 19.07.1968 | 1997/1997 | 2 (0) | |
| Odmar Færø | 04.09.1963 | 1993/1993 | 1 (1) | |
| Óli Hansen | 26.11.1977 | 2004/2004 | 1 (1) | |
| Rúni Justinussen | 28.06.1970 | 1993/1993 | 1 (1) | |
| Bjarki Mohr | 14.02.1968 | 1993/1993 | 1 (1) | |
| Ib Mohr Olsen | 23.11.1965 | 1990/1990 | 1 (1) | |
| Beinur Poulsen | 10.01.1963 | 1988/1988 | 1 (1) | |
| Sunvard Joensen | 14.07.1978 | 2000/2000 | 1 (0) | |
| Palli Augustinussen | 16.12.1980 | 2002/2002 | 1 (0) | |
| Hans Leo í Bartalsstovu | 18.09.1958 | 1988/1988 | 1 (0) | |
| Poul Ennigarð | 29.02.1977 | 1996/1996 | 1 (0) | |
| Pauli G. Hansen | 09.04.1980 | 2004/2004 | 1 (0) | |
| Ingi Højsted | 12.11.1985 | 2003/2003 | 1 (0) | |
| Sjúrður Jacobsen | 29.08.1976 | 2002/2002 | 1 (0) | |
| Poul F. Joensen | 21.08.1967 | 1990/1990 | 1 (0) | |
| Klæmint Matras | 20.05.1981 | 2002/2002 | 1 (0) | |
| Oluf Mortensen | 15.09.1967 | 1992/1992 | 1 (0) | |
| Vagnur Mohr Mortensen | 10.02.1983 | 2004/2004 | 1 (0) | |
| Kári Nielsen | 03.03.1981 | 2004/2004 | 1 (0) | |
| Heri Olsen | 25.01.1973 | 1995/1995 | 1 (0) | |
| Jógvan Petersen | 27.03.1955 | 1989/1989 | 1 (0) | |
| Símun Samuelsen | 21.05.1985 | 2003/2003 | 1 (0) | |

**...framhald av síðu 6**

- Í útlandinum gjørdi eg einki annað enn fekst við fótbólt, og soleiðis er tað eisini her á Toftum. Vit hava higartil vant eina ferð hvønn dag. Ætlanin er, at vit skulu venja fýra ferðir um vikuna, tá ið dystir vera í vikuskiftunum. Harafturat verður individuel venjing við nøkrum spælarum eitt kvøld um vikuna, og tá fari eg at venja saman við teimum. Tað vil við øðrum orðum siga, at venjingin verður eins nógv, sum hon hevur verið. Tað er ikki minst upp til mín at syrgja fyri, at intensiteturin verður góður. Í dystunum fara vit ivaleyst at verða roknaðir sum favorittar. Tað havi eg sagt við spælararnar, at vit mugu læra at liva við. Lyklaorðið er at vera eyðmjúkur yvirfyri uppgávuni, sum er tann næsta á skránni. Um tað eydnast, so fer tað at bera langt.

*Hevur tú hoyrt nakað um landsliðsmøguleikarnar hjá tær?*

- Eg var ikki úttikin til venjingarleguna í Spania. Eg hoyrdi einki um tað, men eg skilti tað soleiðis, at fleiri av veteranunum ikki vóru við. Higartil haldi eg meg ikki hava spælt meg av liðnum. Eg vóni og rokni við, at møguleikin fer at vera fyri at halda tørn um sessin, sum eg havi havt seinastu tíggju árini. Tá verður tað upp til mín at vísa, hvussu væl eg veri fyri. Eg eri svangur eftir at spæla fleiri landsdystir, og tað er eitt gott útgangsstøði, heldur Julian Johnsson.

*Og hvat heldur tú um altjóða møguleikarnar hjá Jann Inga Petersen?*

- Tað hevur neyvan verið serliga hugaligt hjá honum í Fremad Amager. Í mótgongd eru møguleikar at mennast. Hetta er fyrsta árið, at vit báðir eru í felag saman. Eg havi ongantíð ivast í, at Jann Ingi hevur góðar gávur at spæla fótbólt, og síðani vit komu til Toftir haldi eg, at tað hevur gingið skjótt rætta vegin hjá honum. Eg vóni sjálvandi, at landsliðsvenjarin fer at veita honum sama møguleikan at vísa síni evni, sum hann fer at veita hinum, ið hava verið á landsliðnum. So verður tað upp til Jann Inga at vísa tað, sum skal til fyri at verða úttikin.



*- Í útlandinum gjørdi eg einki annað enn fekst við fótbólt, og soleiðis er tað eisini her á Toftum, sigur Julian Johnsson, sum vónar, at talið av landsdystum kann fara upp um teir 60, sum hann higartil er skrásettur fyri*